## Eingin lønarveitsla

Um vikuskiftið fara fakligi landsfelagsskapurin í Danmark og arbeiðsgevarafelagið at tingast um nýggjan sáttmála fyri 600.000 fólk á tí privata arbeiðsmarknaðinum. Vanliga plaga partarnir at vera fámæltir undan samráðingunum, og tí kom tað óvart á tey flestu, at LO-formaðurin,. Harald Børsting (myndin), longu undan samráðingunum segði seg vera sinnaðan at halda aftur við lønarkrøvum. Í samrøðu við Berlingske Tidende í dag sigur hann, at ein má viðurkenna, at tað er ikki rúmd fyri nakrari lønarveitslu hesaferð. Tí fer LO heldur at leggja seg eftir øðrum viðurskiftum, sum kunnu geva limunum tryggari umstøður, sigur Harald Børsting.



## Eingin vøkstur í Týsklandi

Nýggj tøl hjá hagstovubi Destatis vísa, at samanborið við seinasta ársfjórðing í 2008 var eingin vøkstur í týska búskapinum seinasta ársfjórðing í fjør. Ein talsmaður fyri hagstovuna sigur, at tølini eru eitt vónbrot, tí bæði í øðrum og triðja ársfjórðingi í fjør vaks týski búskapurin 0,5 prosent samanborið við somu mánaðir í 2008. Destatis sigur, at hóast búskaparvøksturin ikki var meiri enn 0,5 prosent teir báðar ársfjórðingarnar í fjør, var talan um stóra broyting samanborið við tann fyrsta ársfjórðingin í fjør, tá búskapurin tódnaði meiri enn trý prosent. Týski búskapurin er tann størsti í Evropa og gongdin har er avgerandi fyri, hvussu skjótt Evropa kemur burtur úr kreppuni.

# Landavegin





TÓRSHAVNAR KOMMUNA



*Í gjár fingu øll foreldur, sum avheintaðu børnini hjá sær á dagstovnum í Havn, skriv frá kommununi, har millum annað varð greitt frá, at kanningin ikki skal síggjast sum hvør er best ella ringast. Í Århus verður kanning, júst sum hendan, tó nýtt sum amboð hjá foreldrum, tá tey velja dagstovn*

*Kelda: Tórshavnar kommuna*



*Mikudagin upplýsti Tórshavnar kommuna dagstovnunum, at tað fór at bera til at samanbera úrslitini av stovnunum*

## Fund um upplýsingar

Av tí, at avtala varð gjørd at úrslitinihjáhvørjumeinstakum stovni skuldu vera loynilig, so vildi kommunan hava allar stovnarnir hvør í sær at geva sítt samtykki til, at innlit varð latið í nøgdsemi við einstaku stovnarnar.

–Stovnarnir hava føltnógvar reaktiónir frá foreldrum, og summi blivu kløkk av, at tað varð kunngjørt, hvørjir tríggirteir best umtóktu stovnarnir eru, sigur Katrin Petersen, leiðari á barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

Hon vísir á, at tað upprunaliga var ætlanin, at øll úrslitini skuldu vera loynilig, men tá innlit varð biðið í upplýsingarnar, so vildi kommunan hava dagstovnarnar at geva sítt samtykki.

Men Katrin Petersen heitir eisini á fólk, um at vera varðin at brúka hesi úrslitini.

– Hetta er eitt grunt ov grundarlag, og nøgdsemið kann so skjótt broytast, sigur leiðarin á barna- og ungdómsdeildini.

**-eij**

## Ternuryggur best umtóktur



*Marjun Hentze er leiðari á best umtókta dagstovninum í Tórshavnar kommunu*

Beinanvegin kanningin varð løgd fram varð kunngjørt, at býlingshúsið á Ternuryggi er best umtókt í kanningini.

– Tað er ein góð kensla. Ein góð viðurkenning frá foreldrunum, segði Marjun Hentze, leiðari á Býlingshúsinum á Ternuryggi, við Sosialin 26. januar.

Hon legði afturat, at tað er torført at siga, hví júst hennara stovnur er so væl umtóktur, men hevur eitt boð.

– Tað er tað góða arbeiði, ið verður gjørt her á stovninum, ið hevur nøkta nøgdsemis tørvin hjá júst okkara foreldrum, legði hon afturat.

Marjun Hentze greiddi somuleiðis frá, at tey fara at halda fast við góða støðið, og at tað eisini fer at merkjast, at tingini alla tíð mugu betrast.

– Í kanningini siga teir, at krøvini fara at blíva hægri, og tað veit eg eisini. Tí mugu vit alla tíðina royna at gerast betri, sigur leiðarin á stovninum við best nøgdum foreldrum, segði Marjun Hentze 26. januar.

**-eij**